Lítið studio – stórur lurtaraskari

Hesa seinastu vikuna hevur stjórin, Jógvan Jespersen einsamallur røkt tíðindatænastuna hjá útvarpinum. Hetta hevur verið ein strævin vika, men við royndum sínum hevur hetta borið væl til. Kl. 13 í gjár komu so starvsfólkini aftur til arbeiðis

ÚTVARP
Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

Headsettið er sett til. Pulturin er tendraður, og nú skal so fáast fatur á fíggjarmálaráðharranum og formanninum í Starvsmannafelagnum

Ikki eitt ljóð hoyrist í gongini.

Øll ljós eru sløkt. Eingin telda er tendrað. Allar hurðar afturlætnar. Ikki eitt menniskja at síggja. Og tó!

Uppi í innasta rúminum á ovastu hæddini situr ein maður og arbeiðir við sveittabrot. Stjórin sjálvur.

Hann tosar í telefon. Klokkan er 10:36 og líkt er til at okkurt er í umbúna á almenna arbeiðsmarknaðinum. Jógvan Jespersen hevði Bárð Nielsen í hinari telefonin.

- Hetta er útvarpið. Jógvan. Eg forstandi at tað er uppundir endan av støðuni.

Hann steðgar á eina løtu, meðan fíggjarmálaráðharrin greiðir honum frá støðuni beint nú.

- Ja, eg skilji. Eg ætlaði bara at vita, hvar eg kann fáa fatur á tær aftaná kl. 11. OK, á hesum nummarinum. Fínt!

Hann leggur telefonina frá sær. Fær sær eitt sindur av kaffi, og setst aftur við telduna at skriva.

Høvuðstíðindini eru har. Tey alment løntu skulu aftur til arbeiðis. Nú skulu so tey útlendsku tíðindini gerast liðug og at enda veðrið.

Knøttarnir á telduni ganga heitir. Stjórin er ikki óvanur við slíkt arbeiði. Hann hevur drúgvar royndir sum tíðindamaður, og nú sæst eisini ein endi á hesi arbeiðsósemjuni.

Stjórin hevur sitið so eina á tíðindavaktini í eina viku. Gongst soleiðis sum tíðindini nú ljóða, koma starvsfólkini øll aftur til arbeiðis kl. 13.

So verður aftur lív í borgini.

Skipað borð

Skrivstovan hjá stjóranum er rúmlig. Har er eitt skrivaraborð og eitt minni borð við sofu, har smærri fundir kunnu haldast.

Skrivaraborðið er á tremur við alskyns pappírum og málum, sum ein stjóri til eina og hvørja tíð má og skal taka støðu til.

Her er nógv at halda skil á. Hjá einum stjóra er tað umráðandi at hesi skjøl og pappír liggja skipað. Eisini hjá einum útvarpsstjóra. Og tað gera tey.

Mitt á borðinum stendur tann obligatoriski kaffikoppurin við rúkandi kaffi í. Tað munnu vera fáir útvarpsmenn sum ikki dáma kaffi.

Móti vegginum stendur so eitt av amboðunum hjá einum tíðindastovni: Teldan. Ein stórur skíggi, har Jógvan longu hevur skrivað tey fyrstu útlendsku tíðindini.

"Norske studenter" eitur ein yvirskrift á frummálinum. Helst verða hesi tíðind-

Telefonin er eitt hent amboð hjá einum tíðindamanni – og hjá einum útvarpsstjóra



PqÖoq `l r kqov*hsÐia
ē E l qbi CÐo l v r j /.+ l hq l _bo

Coâddg^hsÐiaf÷ /.+ lhql_bo hi+ /0+0- pmÍi^
@l r kqov Pfpqbop qfi a^kp ē E l qbi CÐo l v r j +

>qdlkdr j bohfo qfi a^kpfk cē^pq ē Hrkkfkd^o*
pqlsrkr j â E^sk ld Ork^sâh ld ē E l qbi
CÐo l v r j

Coē hi+ .5+-- * //+-- _gÖ÷^o Di^ppqls^k7
Phbig^agÖo^o^dl rq) @l r kqov ?àcc ld
Mbor j l r ppb+

@l r kqov moâpfo7
A^kpro ho+ .5-)*
AÐdro÷f ho+ //2)*

Dfpqfkd mo+ mbop+ â a r m r iqh^ j ^of++ho+ 1--)*
Dfpqfkd bo âolhk^÷ j lodrk j ^q+
Bvh^ cvof bfkhriqh^ j ^o ho+ /--)

?âibddf÷ _lo÷ ld dfpqfkd ē e l qbiclolv^o+cl
bii^ ē qbi+ 0.42--

mbqro # mbqro ± 0/-54-

Hotel Føroyar ★★★★
Tel 31 75 00